

STH

# Skeið til Teldukoyrikort - heysthálvan 2000

| Skema | | | | | 2000 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skeið | Nr. | Tímar | Kl. | Kostnaður | August | September | Oktober | November | Desember | Januar | Februar |
| Windows | F1 | 12 | 8.30-12.15 | 1900 | 22.,24.,29. | | | | | | |
| Word | F2 | 16 | 8.30-12.15 | 2600 | 31. | 5.,7.,12. | | | | | |
| Excel | F3 | 16 | 8.30-12.15 | 2600 | | 14.,19.,21.,36 | | | | | |
| Acces | F4 | 16 | 8.30-12.15 | 2600 | | 28. | 3.,5.,17 | | | | |
| Powerpoint | F5 | 8 | 8.30-12.15 | 1500 | | | 19.,24. | | | | |
| Internet | F6 | 12 | 8.30-12.15 | 1900 | | | 26.,31. | 2. | | | |
| Grundskeið í teld | F7 | 12 | 8.30-12.15 | 1900 | | | | 7.,9.,14. | | | |
| Windows | K1 | 12 | 16.00-20.00 | 1900 | 31. | 7.,14. | | | | | |
| Word | K2 | 16 | 16.00-20.00 | 2600 | | 21.,28. | 5.,12 | | | | |
| Excel | K3 | 16 | 16.00-20.00 | 2600 | | | 19.,26. | 2. ,9. | | | |
| Acces | K4 | 16 | 16.00-20.00 | 2600 | | | | 16.,23.,30. | 7. | | |
| Powerpoint | K5 | 8 | 16.00-20.00 | 1500 | | | | | 14.,21. | | |
| Internet | K6 | 12 | 16.00-20.00 | 1900 | | | | | | 4.,11.,18 | |
| Grundskeið í teld | K7 | 12 | 16.00-20.00 | 1900 | | | | | | 25. | 2.,8. |

Fyri tey, ið melda seg til øll **sjey skeiðini,** er kostnaðurin **kr. 10.000,00** íroknað undirvísing, skeiðtilfar og mat.
Kostnaður fyri royndir:
Fyri tey, ið hava verið á telduskeiði hjá STH kr. 350,00
Fyri sjálvlesandi kr. 450,00
Kostnaður fyri umroyndir kr. 150,00

## SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH

Tel: 318813, Fax: 313374, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo, http: //sth.olivant.fo

# Skrivstovufólk-menningarmøguleikar

Søkt verður eftir fólki til skrivstovu okkara á Toftum. Arbeiðið umfatar logistikk, bókhald og aðrar fyrifallandi uppgávur. Ætlanin við starvinum er, at viðkomandi innanfyri stutta tíð skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hjálpa til við innkeypi av rávørum.

Viðkomandi hevur stórar møguleikar at mennast innanfyri yrki og skal við tíðini sjálv/ur leggja arbeiðið til rættis. Lønin er kappingarfør og hækkar við ábyrgdini hjá viðkomandi.

Umsøkjarin skal hava drúgvar royndir innanfyri skrivstovuyrki. Viðkomandi skal vera nærløgd/nærlagdur og passa inn í eitt umhvørvi eyðkent við óformligum samverutóna.

Umsøknin skal sendast til Valhalla innan 15. august. Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Peter vognsen Nørgaard, stjóra.

**Valhalla**
supplier of seafood

Valhalla P/F • Niðara Gøta 76 • 188 Hoyvík, Faroe Island • P/F reg. nr. 2900
Tel. +298 321880 • Fax +298 321890 • E-mail: valhalla@post.olivant.fo

Valhalla er ein nýggj fyritøka sum varð stovnað í 1999 við adressu í Hoyvík. Nýggj framleiðsluhøll við skrivstovu er á Toftum. Fyritøkan í Føroyum framleiðir og selur feskar fiskavørur sum seljast til nógvar minni kundar innanfyri EU.

# Fá ókeypis ráðgeving áðrenn tú byrjar nýtt virki

Hugsar tú um at byrja við egnum virki? So kannst tú fáa serkøna ráðgeving áðrenn tú byrjar. Við skipanini "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av fyritøku" kannst tú fáa ráðgeving fyri kr. 7.000,- hjá Virkisráðgeving Sp/f sum hjálpir tær í gongd.

- Ráðgevin verður tín samstarvsfelagi, tá ið tú avgerð at byrja við egnari fyritøku
- Tú fær hjálp til at gera eina virkisætlan, ið lýsir fullt út títt hugskot
- Tú fær eisini at vita um so er, at ætlanin ikki tykist burðardygg
- Virkisráðgevin kann eisini vísa til aðrar ráðgevarar, um tað gerst neyðugt

Ynskir tú at vita meira um "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av egnari fyritøku" so ring til TK-stovuna.

Sosialurin - 311820

**TK-STOVAN**
Niels Finsensgøta 37 • 100 Tórshavn
Tel. 31 73 66 • Fax 31 93 63



## Vit gera alt URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

**Fa. SÍMUN DALSGAARD**
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

# Arbeiði

Hevur tú hug at hjálpa til í nýggja køkinum í Club 20?

Í samband við at vit hava opna nýggja café í neðra sóknast vit eftir 2 hjálparfólkum til køk okkara.

Ikki er neyðugt við útbúgving. Ein treyt er tó at tú ert fylt/ur 18 ár.

Um hettar hevur tín áhuga so vinarliga ringið og tosið við Jeanette á tlf.:

**216804 áðrenn kl. 17.00**
**315628 eftir kl. 17.00**

Discoteque
**Club 20**

# Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 13. august kl. 16.00 heldur Hanus A. Samuelsen fyrilestur í Sandavágs kirkju um Halgidagssiðir.

Sunnudagin 13. august kl. 16.00 heldur Johs. Andr. Næs fyrilestur í Havnar kirkju um Kirkjusiðir.

**FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR**
Postboks 1121 · tlf. +298 321132 · fax +298 321761 · FO-110 Tórshavn



**svf**

Starvið sum

# Fyritaksstjóri í Sjónvarpi Føroya

er leyst at søkja

Fyritaksstjórin er settur beint undir og við tilvísing beinleiðis til sjónvarpsstjóran. Bygnaðurin á stovninum er "flatur" við eini stjórn við stápseindum, eini fíggjar- og fyrisitingardeild, eini kt-deild umframt programmdeildunum.

Bygnaðurin í Sjónvarpi Føroya er seinastu tvey árini munandi umskipaður, og fíggjarstýringin og mannagongdir annars eru og verða tillagaðar nýggja bygnaðinum. Hetta ber m.a. í sær, at tær ymsu deildirnar hava fingið størri sjálvstøðu og samstundis munandi størri fíggjarligar ábyrgdir.

**Starvið:**

Fyritaksstjórin hevur við ábyrgd mótvegis sjónvarpsstjóranum dagliga raksturin av stovninum um hendi, bæði hvat fyrisiting og fíggjarstýring viðvíkur. Starvið fevnir soleiðis um

- gerandis budgetteftirlit
- starvsfólkaviðurskifti
- fyrisitingarligar mannagongdir
- dagligt keyp

Høvuðsuppgávurnar hjá fyritaksstjóranum eru at leiða og skipa fyri tí dagliga arbeiðinum á fíggjar- og fyristingardeildini og at leggja til rættis ársfíggjarætlanir og langtíðar fíggjarætlanirnar innan teir karmar, sum stovnurin hevur at virka undir. Ein týðandi leiklutur hjá fyritaksstjóranum er at virka sum samstarvspartur bæði hjá stjóranum og hinum deildarstjórunum í øllum fíggjarligum og fyrisitingarligum málum. Á inntøkusíðuni skal fyritaksstjórin virka sum samstarvspartur hjá marknaðardeildini.

Miðað verður eftir, at fyritaksstjórin er virkandi stjóri, tá sjónvarpsstjórin er burturstaddur ella hevur forfall.

Arbeiðsuppgávurnar fevna um:

- dagligu roknskaparførsluna og at gera deildarroknskapir
- at seta upp roknskapir fyri tíðarskeið og ársroknskapir
- at hava um hendi rakstrar- og gjaldførisætlanir
- at fyrisita yvirordnað starvsfólkaviðurskifti
- at skipa fyri mannagongdum á øllum fyrisitingarligum økjum
- at greina starvsfólkapolitikk og virkisgongdir
- leiðsluna av móttøkuni og skrivstovuni
- ábyrgd av ognunum, sum stovnurin húsast í

**Umsøkjarin:**

Starvið er avbjóðandi, og hevur tú hug at royna teg, krevst, at tú hevur lokið búskaparligt embætisprógv ella hevur aðra samsvarandi útbúgving. Tað hevur eisini áhuga, hvørjar viðkomandi royndir, tú annars hevur.

Tað er avgerandi, at tú sum umsøkjari eisini hevur ein liðiligan hugburð og góð samstarvsevni. Starvið krevur evnini til at arbeiða sjálvstøðugt og at taka avgerðir — ofta í eini knappari vending - og at boða stavsfelagum og starvsfólki frá teimum á ein tílíkan hátt, at tað elvir til loysnir og framburð.

**Setanarviðurskifti:**

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

- - - - -

Hevur tú áhuga fyri at fáa meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Trónd Djurhuus, sjónvarpsstjóra, á tlf. 340400 ella til Jógvan Amonsson, ríkisgóðkendan grannskoðara, Inpact á tlf. 314700.

Ætlanin er at seta starvið skjótast tilber. Umsóknir við prógvum og møguligum øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast í brævbjálva, merktur „Umsókn/SvF", til

Grannskoðaravirkið Inpact p/f,
att.: Jógvan Amonsson,
R.C.Effersøesgøta 26,
100 Tórshavn

soleiðis, at tær eru virkinum í hendi í seinasta lagi **friggjadagin 25. august 2000 kl. 16**.

Tórshavn, 27. juli 2000

**Sjónvarp Føroya**

**Starv**

# EDV-fólk

Strandfaraskip Landsins søknast eftir einum dugnaligum KT-umsitara.

**Høvuðsuppgávurnar verða**:

- servara-konfigurering, rakstur og viðlíkahald
- installatiónsuppgávur og tekniskan support av eginteldum og brúkaraforritum
- umsita trygdarskipanir
- viðlíkahald av dokumentatiónstilfari
- leggja ætlanir fyri dagføringar og útbyggingar

Umframt at hava dagligu rakstrarábyrgdina fær KT-umsitarin møguleikan at luttaka í nógvum spennandi prosjektum. Eisini eru útbúgvingarmøguleikarnir góðir.

**Førleikakrøv**

Vit rokna við, at tú hevur:

- hóskandi edv-útbúgving
- kunnleika til netskipanir, helst Windows NT
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- góð samstarvsevni

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

*Strandfaraskip Landsins*
att. Starvsfólkadeildin
Postboks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 21. aug. 2000.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Andrass Jensen, KT-leiðara, á tlf. 343000 ella e-mail anj@ssl.fo.

**STRANDFARASKIP LANDSINS**

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*



## *Enn ein møguleiki at ognar sær teldukoyrikortið*

Fá teldukoyrikortið fyri hálvan prís.

Vit hava fleiri møguleikar til stovnar, fyritøkur og einstaklingar.

Hava tit undirvísarar, ***hava vit høli og útgerð.***

Hava tit hvørki undirvísarar ella høli, ***hava vit bæði.***

Búgva tit á útoyggj, hava skiftandi arbeiðistíðir ella eru til skips, hava vit eisini loysnina til tykkara.

Tøknidepilin er góðkent testsentur til teldukoyrikortið.

Um tú/tit eru áhugað, fæst meira at vita á tlf. 211434 ella 214144.
Eisini kann farast inn á www.postfelag.fo

**Føroya Postfelag**
Tinghúsvegur 15 · 100 Tórshavn

*Lýsið í* **sosialinum**